**Løgtingið**
Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2025 (Flyting av stjórnarráðum og Eirargarður 2 nýtast til lestrarbústaðir)

**Uppskot**
**til**
**eykajáttanarløgtingslóg**
**fyri august 2025**
(Flyting av stjórnarráðum og Eirargarður 2 nýtast til lestrarbústaðir)

Fíggjarmálaráðið

Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit** | | | | **2025** |
|---|---|---|---|---|
| | | Rakstraræetlan | | Løguætlan |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 11.** | **Heilsumál** | **420** | **-** | **-** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *420* | *-* | *-* |
| **§ 12.** | **Almanna- og mentamál** | **420** | **-** | **-** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *420* | *-* | *-* |
| **§ 18.** | **Umhvørvismál** | **-** | **-** | **0** |
| | *22. Íbúðarmál* | *-* | *-* | *0* |
| | **Tilsamans** | **840** | **0** | **0** |
| Tilsamans | | 840 | 0 | 0 |
| Yvirskot | | - | -840 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-840** | **-** |

# Tekstur

# § 11 Heilsumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 420 | 420 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **420** | **-** |
| 11.11.1. Fyrisiting | | 420 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **11.11.1.** | **Fyrisiting** | | | |
| 24. | Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | J | 15.234 | - |
| | | **EYJ** | **420** | **-** |

# § 12 Almanna- og mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 420 | 420 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **420** | **-** |
| 12.11.1. Fyrisiting | | 420 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **12.11.1.** | **Fyrisiting** | | | |
| 26. | Almanna- og mentamálaráðið (Rakstrarj.) | J | 17.749 | - |
| | | **EYJ** | **420** | **-** |

# § 18 Umhvørvismál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løguætlan | 0 | 50.000 | 50.000 |
| **Íbúðarmál** | | **50.000** | **50.000** |
| 18.22.1. Ymsar útreiðslur | | 50.000 | 50.000 |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **18.22.1.** | **Ymsar útreiðslur** | | | |
| 02. | Bygningur til lestrarbústaðir (Løguj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **50.000** | **50.000** |

# Almennar viðmerkingar

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur við hesum fram uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri Løgtingið. Samanumtikið gevur eykajáttanaruppskotið eitt hall á 0,8 mió. kr. (RLÚ 1).

Leingi hevur verið ætlanin, at aðalráðini, sum halda til í Eirargarði 2, skulu flyta nærri Tinganesi. Henda ætlanin er nú í umbúna at verða framd, og verður verandi virksemi flutt út í næstum. Heilsumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið, Heilsustýrið og Javnstøðunevndin flyta tí í leigað høli og høli hjá landinum í Tinganesi í heyst.

Landsstýrið ynskir, at bygningurin, sum flutt verður úr, og sum áður hevur verið nýttur til lestrar- og ungdómsbústaðir, skal brúkast til tað aftur.

Ein arbeiðsbólkur hevur handað landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum ítøkilig tilmæli um at finna loysnir uppá vaksandi bústaðartørvin í Føroyum til tess at tryggja 2.000 fleiri bústaðir innan 2031. Tilmælið vísir á tíggju ítøkilig átøk, ið skulu bøta um bæði útboðið og gagnnýtsluna av bústøðum.

M.a. verður mælt til, at Húsalánsgrunnurin raðfestir bygging av smáum og bíligum bústøðum til ung, lesandi og eldri. Lagt verður upp til at seta í verk átøk, sum bæði geva skjótar loysnir og tryggja haldførar broytingar í bústaðarskipanini.

Avgjørt er tí, at fyrsta ítøkiliga verkætlanin verður at byggja Eirargarð 2 um til lestrar- og ungdómsbústaðir, sum Húsalánsgrunnurin skal umsita og leiga út.

Verður hugt nærri at hvørjum øki sær, fevnir eykajáttanaruppskotið um fylgjandi:

Á § 11 Heilsumál verður biðið um 0,4 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Heilsumálaráðið verður hækkað við 420 tús. kr.

Á § 12 Almanna- og mentamál verður biðið um 0,4 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Almanna- og mentamálaráðið verður hækkað við 420 tús. kr.

Á § 18 Umhvørvismál er umbønin útreiðsluneutral. Biðið verður um nýggja útreiðsluneutrala løgujáttan til Bygning til lestrarbústaðir.

Fíggjarmálaráðið, 14. august 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna

Bjarni Askham Bjarnason

# Viðmerkingar

# § 11 Heilsumál

## Felagsútreiðslur

## 11.11.1. Fyrisiting

### 11.11.1.24. Heilsumálaráðið (Rakstrarjáttan)

Landsstýrið hevur ætlan at umbyggja Eirargarð 2 til lestrarbústaðir. Heilsumálaráðið og Heilsustýrið flyta tí í leigað høli í heyst. Heilsumálaráðið skal flyta í leigað høli í Kopargøtu 1.

Heilsumálaráðið hevur gjørt treytaða avtalu við útleigara um høli. Kostnaðurin at flyta er mettur til 150 tús. kr. Roknað verður við 50 tús. kr. í øðrum útreiðslum.

Leigukostnaðurin er 72 tús. kr. um mánaðin, ella 864 tús. kr. um árið. Upphæddin verður javnað árliga. Leigukostnaðurin fyri tríggjar mánaðir í 2025 er um 220 tús. kr.

Biðið verður um 420 tús. kr. í játtan til endamálið.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 15.234 | 420 | 15.654 |
| Útreiðslur | 17.686 | 420 | 18.106 |
| Inntøkur | 2.452 | - | 2.452 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 13.659 | 420 | 14.079 |
| **Útreiðslur** | **13.659** | **420** | **14.079** |
| 11. Lønir v.m. | 11.052 | - | 11.052 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.208 | 150 | 1.358 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 100 | 50 | 150 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 10 | 220 | 230 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.289 | - | 1.289 |
| **21. Ráð og nevndir** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 120 | - | 120 |
| **Útreiðslur** | **120** | **-** | **120** |
| 11. Lønir v.m. | 120 | - | 120 |
| **26. Tilbúgving** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 842 | - | 842 |
| **Útreiðslur** | **842** | **-** | **842** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 842 | - | 842 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **27. Verkætlanir** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 570 | - | 570 |
| **Útreiðslur** | **570** | **-** | **570** |
| 11. Lønir v.m. | 120 | - | 120 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 450 | - | 450 |
| **30. Felagsfyrisiting** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 43 | - | 43 |
| **Útreiðslur** | **2.495** | **-** | **2.495** |
| 11. Lønir v.m. | 1.049 | - | 1.049 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.377 | - | 1.377 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 69 | - | 69 |
| **Inntøkur** | **2.452** | **-** | **2.452** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *192* | - | *192* |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *2.260* | - | *2.260* |

# § 12 Almanna- og mentamál

## Felagsútreiðslur

### 12.11.1. Fyrisiting

#### 12.11.1.26. Almanna- og mentamálaráðið (Rakstrarjáttan)

Landsstýrið hevur ætlan um at umbyggja Eirargarð 2 til lestrarbústaðir. Almanna- og mentamálaráðið og Javnstøðunevndin skulu tí eftir ætlan flyta í leigað høli á Bryggjubakka 27 og í Skibsted í Tinganesi frá 1. oktober 2025.

Almanna- og mentamálaráðið er enn í samráðingum við útleigaran um endaliga leigumálið á Bryggjubakka 27, ímeðan hølini í Skibsted verða klár at flyta inn í uttan leigukostnað.

Ætlanin er at yvirtaka leigumálið hjá Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum og Tunnilsfelagnum á Bryggjubakka 27. Talan er um umleið 461 m² á 1.376 kr., t.e. 634 tús. kr. um árið. Harumframt verður neyðugt at umvæla hølini til endamálið, og mett verður at umvælingin fer at kosta 1,1 mió. kr., sum skal gjaldast aftur yvir eitt fimm ára tíðarskeið. Leigukostnaðurin hækkar í hesum tíðarskeiði við 242 tús. kr. um árið, tá ið renta er íroknað. Samlaði leigukostnaðurin verður sostatt 876 tús. kr. um árið komandi fimm árini. Leigukostnaðurin í 3 mánaðir í 2025 verður um 220 tús. kr.

Harumframt er kostnaðurin av at flyta mettur til 150 tús. kr., og roknað verður við 50 tús. kr. í øðrum útreiðslum.

Biðið verður um, at játtanin til høvuðskontu 12.11.1.26. Almanna- og mentamálaráðið verður hækkað við 420 tús. kr. til endamálið, har útreiðslurnar til flyting vegna Javnstøðunevndina eru íroknaðar, men frameftir fer Javnstøðunevndin væntandi at gjalda ein part av leiguútreiðslunum.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 17.749 | 420 | 18.169 |
| Útreiðslur | 17.749 | 420 | 18.169 |
| **20. Vanligt virksemi** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 16.450 | 420 | 16.870 |
| **Útreiðslur** | **16.450** | **420** | **16.870** |
| 11. Lønir v.m. | 13.266 | - | 13.266 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.756 | 150 | 1.906 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 130 | 50 | 180 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 10 | 220 | 230 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.288 | - | 1.288 |
| **27. Heildarætlan um harðskap** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 1.099 | - | 1.099 |
| **Útreiðslur** | **1.099** | **-** | **1.099** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.099 | - | 1.099 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **29. Miðlastuðulsnevndin** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 100 | - | 100 |
| **Útreiðslur** | **100** | **-** | **100** |
| 11. Lønir v.m. | 70 | - | 70 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 30 | - | 30 |
| **30. UNESCO** | | | |
| Nettoútreiðslujáttan | 100 | - | 100 |
| **Útreiðslur** | **100** | **-** | **100** |
| 11. Lønir v.m. | 60 | - | 60 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 40 | - | 40 |

# § 18 Umhvørvismál

## Íbúðarmál

### 18.22.1. Ymsar útreiðslur

#### 18.22.1.02. Bygningur til lestrarbústaðir (Løgujáttan)

Landsstýrið hevur í samráði við Húsalánsgrunnin gjørt av, at Húsalánsgrunnurin skal gera bygningin hjá Landssjúkrahúsinum í Eiragarði 2 í Tórshavn til lestrar- og ungdómsbústaðir.

Leingi hevur verið ætlanin, at aðalráðini, sum halda til í Eirargarði 2, skulu flyta. Henda ætlanin er nú í umbúna at verða framd, og verður verandi virksemið flutt út í næstum. Landsstýrið hevur ynski um, at bygningurin, sum áður hevur verið nýttur til lestrar- og ungdómsbústaðir, skal brúkast til tað aftur.

Ein arbeiðsbólkur hevur handað landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum ítøkilig tilmæli um at finna loysnir uppá vaksandi bústaðartørvin í Føroyum til tess at tryggja 2.000 fleiri bústaðir innan 2031. Tilmælið vísir á tíggju ítøkilig átøk, ið skulu bøta um bæði útboðið og gagnnýtsluna av bústøðum.

M.a. verður mælt til, at Húsalánsgrunnurin raðfestir bygging av smáum og bíligum bústøðum til ung, lesandi og eldri. Lagt verður upp til at seta í verk átøk, sum bæði geva skjótar loysnir og tryggja haldførar broytingar í bústaðarskipanini.

Avgjørt er tí, at fyrsta ítøkiliga verkætlanin verður at byggja Eirargarð 2 um til lestrar- og ungdómsbústaðir, sum Húsalánsgrunnurin skal umsita og leiga út. Orsakað av kravinum um byggistig verður ikki mett møguligt at frámatrikulera økið, sum bygningurin stendur á. Til ber ei heldur at lata ella selja bygningin, uttan at undirlendið fylgir við. Eisini hevur matrikullógin avmarking uppá 10 ár fyri tílíkt leigumál.

Tí er loysnin við løgtingslóg at lata Húsalánsgrunninum ræði á bygninginum Eirargarður 2 í óavmarkaða tíð. Víst verður til uppskot til løgtingslóg um at geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eiragarður 2 í Tórshavn.

Eirargarður 2 er ein bygningur í 6 hæddum umframt kjallarahæddina. Bygningurin er fyribils mettur til 50 mió. kr. Neyvari meting verður umbiðin, tá ið Húsalánsgrunnurin skal fáa ræði á bygninginum. Við at lata Húsalánsgrunninum ræði á Eirargarði 2 ber til hjá grunninum at útvega millum 43 og 55 lestrar- og ungdómsbústaðir har.

Við játtanini verður bygningurin latin Húsalánsgrunninum sum stuðul til metta keypsupphædd.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | J | EYJ | J + EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur | - | 50.000 | 50.000 |
| Inntøkur | - | 50.000 | 50.000 |
| **10. Bygningur til lestrarbústaðir** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **50.000** | **50.000** |
| 55. Íløgustuðul o.a. | - | 50.000 | 50.000 |
| **Inntøkur** | **-** | **50.000** | **50.000** |
| *42. Søla av løgu o.ø.* | - | *50.000* | *50.000* |